# Eg havi oftast lopið stein av steini

Tordis Vang

ZAKARIAS HEVUR AVRIKAÐ EINA RÚGVU í lívi sínum, og kenna fólk hann aftur sum eitt nú samfelagsfrøðing, politikara, loysingarmann, rithøvund og orðasmið. Fyri landið hevur hann megnað at avrika meira enn flestu, bæði málsliga og mentanarliga, og fyri mítt viðkomandi er hann pápabeiggi, ið millum annað hjálpti at rætta mínar uppgávur tá eg gekk í fólkaskúla. Lærararnir hava allarhelst hugsað sítt, at uppgáva kom inn á háfloygdum føroyskum í fjórða flokki.

At virða bæði føroyska málið, mentanina og landið í síni heild, hava vit í familjuni fingið inn við móðurmjólkini, og er Zakarias sostatt ein fyrimyndarligur maður, ikki bert fyri okkum, men allarhelst eisini fyri tey samsintu í samfelagnum.

Zakarias er í dag áttatifýra ára gamal, og veit tí at hansara æviskeið er farið at halla. Hóast aldur sín, hevur hann seinasta árið hildið føðingardag, havt umsorgan fyri sínum tøttu, og áðrenn hann í vár legði frá sær sum formaður í Varðanum eydnaðist at fáa út 9. og síðsta bindið av kirkjubókunum til 1892. Eisini hættaði hann sær allan vegin til Bíggjar í brúdleyp hjá undirritaðu, og vóru vit fegin um tað.

Hesa vikuna vilja vit fegin heiðra hendan megnarmann, og ynskja vit at fáa innlit í hvussu eitt hendingarríkt og megnar avrikað lív verður lýst í afturskoðan.

At taka samanum eina heila mansøld kann vera trupult, men eg haldi meg vilja byrja við at hoyra um barndómin í Kaldbak. Zakarias er nevniliga næst elstur av fimm systkjum, ið vóru borin í heim í Sølgørðum í Kaldbak. Foreldrini vóru Poul Vang og Elsebeth Kristina Simonsen, ofta nevnd Ebba. Bæði foreldrini høvdu við jørð at gera. Poul var bóndi og mamma hansara Marin Mohr var elsta bóndadóttir heiman av Garði í Hoyvík. Mamma hennara var úr Hvalba og átti eina gyllin í Lítlu Dímun. Elsebeth Kristina var eisini úr Hoyvík, dóttir traðarmannin Hans Simonsen uttan fyri Garðar. Mamman Sanna var úr óðalshúsunum Innistovu í Mykinesi.

Poul tók við festinum eftir pápa sín í Sølgørðum í Kaldbak, og tað var so har, at barnaskógvarnir hjá Zakariasi og systkjunum vórðu slitnir.

Eg havi alt mítt lív hoyrt um hvussu lívið hjá tykkum var í Kaldbak, og kann als ikki ímynda mær hesa tíðina, uttan streym og ikki so frægt sum vegasamband við Hoyvík og Havnina. Hvussu minnist tú aftur á tíðina sum barn saman við ommu og abba?

– Eg veit ikki hvar eg skal byrja ella enda. Tá eg varð føddur í 1940 var einki ið æt atombumbur ella plastikk – men vit fingu øll gassmaskur. Tá eg var fimm ár hoyrdi eg tey vaksnu siga at ein atombumba var brostin í Hiroshima og øll vóru deyð – tað var øgiligt eg varð bangin fyri at hetta kundi gerast verðsins endi. Nógv óhugnaligt er hent í heiminum seinastu áttati árini, men har er nógv at minnast við takksemi. Eitt nú minnist eg væl tá lítlasystur okkara, Sølva, varð fødd stutt áðrenn eg fylti trý ár. Tað var sera spennandi!

*Hevði tú nøkur ávís áhugamál og ítriv sum barn og ungur?*

– Eg vil ikki siga at eg var ítróttarmaður, men eg var eftir torvi hvønn dag, so eg gekk nógv, og svam eg eisini.

– Eg var so heppin at fáa ein lærara í Kaldbak, ið var óførur til svimjing. Hann æt Hans Huusgard. Vit høvdu ongan svimjihyl, men úti við Á í Kaldbak (Høgadalsá) er ein hylur ið eitur Berghylur. Her fór hann út við øllum skúlanum, og lærdi hann fyrsta árið allar næmingarnar at svimja. Eg var hugaður, og svam hvønn dag, eisini út á heystið, heilt til september mána. Eg gavst at svimja tá eg kom til Havnar sum fjúrtan ára gamal, tí mær dámdi ikki klorvatn.

> “Har vóru ymsar politiskar uppfatanir hjá okkum”

## Fólkaatkvøðan í 1946

Eitt minnist Zakarias sera væl, og tað er fólkaatkvøðuna í 1946:

– Tann dagin fóru mamma og eg til Vestmannar at vitja fastur mína Louisu og mann hennara Hans Debes Joensen, sum var lækni har. Á vegnum oman til postbátin til Kollafjarðar hevði mamma onkur ørindi í Kaldbaks skúla, og tað var at atkvøða fyri loysing á fólkaatkvøðuni. So eg var við sum seks ára gamal!

– Tað var heystveður. Systkinabarnið Tórður og eg fóru tíðliga í song, og komu tíðliga upp sunnumorgun og út, men í Vestmanna var púra deytt. Tað vit ikki hugsaðu um, var at tað jú hevði verið fólkaatkvøða, so fólk høvdu fylgt við uppteljingini alla náttina. Vit mólu runt á skipasmiðjuni og á kaiini. Vit komu til hús aftur, og hjá fastur vóru tey so ómetaliga glað fyri sigurin. Tá vit komu aftur til Kaldbaks, vóru vit allir ernir av at hava vunnið.

*So tú byrjaði tína leið innan ta politiska og loysingarsinnaða longu sum smádrongur – var hetta tilvitað heilt frá byrjanini?*

– Ja onkursvegna var tað tað.

– Eitt nú minnist eg, at tá vit komu heim aftur úr Vestmanna, hittust vinmenninir og eg á kaiini, og postmaðurin fekk mær bløðini niðan til okkara. Dimmalætting var eitt blað ið ikki helt við okkum. Eg dugdi ikki at lesa, men sá at har stóð eitt D á blaðnum, so eg ivaðist ikki í at hatta mátti vera Dimmalætting. Eg helt so blaðið í lotinum og regninum, og tá eg kom til hús var lítið gott eftir av tí. Men so vísti tað seg, at tað var Dagblaðið, ið helt við okkum, sum eg hevði farið so illa við. Eg var tískil ein óheppin aktivistur.

– Eg var fyrstu ferð í verkfalli níggju ára gamal. Handilsmaðurin undir Skriðubakka keypti sild, sum skuldi kvørkrast fyri at verða saltað í tunnur. Eg fór til hansara fyri at fáa arbeiði. Hann tók í hendur mínar og segði at tær vóru nakað heitar, og tað var ikki gott fyri sildina, so eg kundi ikki fáa 75 oyru um tíman sum hini, men bert 50 oyru, og hendan dag var einki arbeiði. Dagin eftir var brenniterri og vit hoyggjaðu. Bátarnir høvdu fingið nógva sild. Tá kom heilsa frá handilsmanninum til mín um at koma til arbeiðis. Eg bað heilsa aftur at eg kom ikki uttan so at eg fekk 75 oyru. Beinanvegin komu boð um at eg skuldi fáa 75 oyru, og fór eg tí til arbeiðis, so eg vann mítt fyrsta verkfall.

*Hvaðani kemur tað politiska og loysingarsinnaða frá? Var tað altíð til staðar heima við hús hjá tykkum?*

– Har vóru ymsar politiskar uppfatanir. Zakarias abbi doyði í 1942, og hann var leingi einasti sjálvstýrismaður í Kaldbak. Marin omma var hugað sambandskona, og fór ikki á val fyrr enn abbi var deyður, og hon atkvøddi tí fyri stjórnaruppskotinum á fólkaatkvøðuni.

– Mamma var loysingarkona, og var málsligur aktivistur. Hon hevði gingið í realskúla saman við Sonnu Dahl, og tær høvdu havt Rikard Long sum lærara í føroyskum. Ein mynd av teimum er í bókini um Sonnu Dahl (sí mynd)

– Pápi var ikki líka ivrigur, hann stóð ímillum mammu og ommu. Men hann segði við meg, at hann hevði atkvøtt fyri loysing, og heima hjá okkum hekk ein minnispláta Jack Kampmann hevði gjørt í samband við fólkaatkvøðuna. Seinni varð hon sett á permuna í míni 2010-bók við skjølum um fólkaatkvøðuna (sí mynd).

– Mamma atkvøddi trúliga fyri Fólkaflokkinum hóast faðir til valið í november 1946 atkvøddi fyri Sambandsflokkinum.

– Sjálvur var eg í 1950 sera errin av at mammubeiggi okkara, skiparin Johan í Hoyvík, var nr. 2 á lista Tjóðveldisfloksins í Suðurstreymoy, har nr. 1 var Hanus við Høgadalsá, sum kom inn á ting sum annar av løgtingsmonnum floksins. Elsti bróðir Hanus var giftur í Kaldbak við fastur okkara Gullborg sum var sannførd loysingarkona .

– Á løgtingsvalinum 1954 fekk pápi 15 kaldbaksmenn at atkvøða fyri útbrótarnum úr Fólkaflokkinum Kjartan Mohr, ið hevði sín egna lista og kom inn við einum avlopi upp á fýra atkvøður. Syndring var tí í ættini um politikkin.

## Eg spældi sambandsmaður

– Eg var komin til Havnar í august at ganga í preliminerskúla og át døgurða i landslæknahúsunum hjá Louisu fastur. Hans Debes Joensen stuðlaði Rikard Long, sum á valinum var nr. tvey á fólkafloksllistanum. Næmingarnir á studenta- og preliminerskeiðinum skipaðu fyri politiskum fundi leygarkvøld, men eg fór heldur til gongu inn á Skarð og fekk ein bát at koma eftir mær um fjørðin.

– Tá eg kom í skúla mánamorgun lótu næmingarnir væl at tí áhugaverda politiska fundinum, men har hevði bara eingin verið at verja Sambandsflokkin, og tað hildu tey vera spell. Nøkur kringsettu meg í trappuni á VBV og bønaðu meg um at átaka mær hetta lutverk. Eg var ikki serliga hugaður tí tað var ikki komið mær til hugs at halda politiska røðu, men tey søgdu at eg dugdi væl at tosa, nýkonfirmeraður, og eg skuldi bara siga hvatsumhelst fyri at gera fundin betri. Eg helt tað vera synd í teimum og læt mær so eftirlíka og leygarkvøldið eftir fór eg so ikki heim til Kaldbaks men spældi



> “Hon læs til tannlækna tá, og tað fyrsta hon segði við meg var, at mínar tenn líktist tonnunum hjá einari vinkonu hjá mostur hennara”

at vera sambandsmaður, og flokkurin fekk framgongd. Nýggjur fundur skuldi so verða leygarkvøldið eftir. Tá kom ein ið gekk í fyrsta G og segði mær at hann eisini vildi verja Sambandsflokkin. Eg kendi hvørki slag ella slekt, men hann segði at hann var úr Miðvági og æt Pauli Ellefsen. Hann helt at vit skuldu fyrireika okkum betri til næsta fund, og fekk meg at koma við sær at tosa við blaðstjóran á Dimmalætting Georg Lindenskov Samuelsen, sum var blíður og týður og gav okkum stevnuskrá floksins at lesa.

– Á næsta fundi gekk okkum væl. Serliga legði eg merki til, at Pauli dugdi væl at arga Signar Dam, son javnaðarfor-



# Eg havi altíð lopið frá steini til stein

*... framhald*



mannin Peter Mohr Dam. Mær dámdi væl Signar, so hetta passaði mær ikki væl. Eg kom eftir, at tað var so ivaleyst at hava Paula at verja Sambandsflokkin, so tá næsti fundur var, fór eg heim til Kaldbaks, og síðan havi eg ongantíð á nøkrum fundi vart Sambandsflokkin. Pauli gavst um jóltíðir. Men nú var eg stemplaður sambandsmaður, og í práti manna millum legði eg á allar aðrar flokkar og vardi tað sambandsmenn søgdu. Fyrsta mál har eg ikki kundi taka undir við teimum var tá teir ikki vildu hava nakað útvarp, sum tó kom í 1957, samtykt við einari atkvøðu í meiriluta. At vera ímóti hesum helt eg ongum líkjast, og síðan komu nógv onnur mál uppí, sum gjørdu at eg aftur nærkaðist loysingarstøðu mínari frá 1946. Tá eg kom heim í 1967 valdi eg tí at fara upp í Tjóðveldisflokkin.

### Tað besta vínið kemur seinast

Zakarias gekk í tvey ár á preliminerskeiðið, og síðani tvey ár á studentaskeiðið. Hann varð liðugur sum seytjan ára gamal.

– Tá vit byrjaðu í 1.g vóru vit tíggju málslingar, tríggir dreingir og sjey gentur. Eftir ársroyndina var eg einasti drongur. Við matematikarunum gjørdust vit 17 ið fingu studentsprógv í 1958.

Zakarias varð málsligur studentur, og hevur allarhelst fingið nakað av íblástri frá mammu síni at velja hesa leið. Sjálvur minnist hann eisini væl hvussu áhugin fyri tí málsliga vant upp á seg:

– Tá eg gekk í øðrum preliminerklassa, fór eg at ganga til latín hjá Axel Tórgarð í eitt ár. Eg varð bitin av tí. Tá vit fóru til roynd var Kristian Osvald Viderø próvdómari, og eg var liðugur sum tann síðsti. So sigur Viderø, at tað besta vínið kemur seinast, og fekk eg tann besta karakterin, og tí valdi eg málsligu deild.

– Hesi fýra árini úti á VBV við Skansaveg opnaðu ein nýggjan heim, og mín heilt stóra fyrimynd í hesum var Arnbjørn Mortensen. Hann var lærari í enskum, søgu og fornaldarfrøði. Hann var ein frálíkur pedagogur, og av honum lærdi eg ómetaliga nógv. Hann var síðani rektari hjá mær í Føroya Studentaskúla í Hoyvík, har eg arbeiddi sum lærari í tríati ár.

*Hvussu byrjaði tín leið til at undirvísa?*

– Tað byrjaði í 1958. Tá arbeiddi eg sum ferðalærari í eitt ár. Í Suðurstreymoy vóru tá fimm bygdir, ið ikki høvdu vegasamband. Tær vóru Kaldbak, Sund, Kaldbaksbotnur, Norðradalur og Syðradalur. Eg var eina viku í Norðradali og eina viku í Syðradali.

– Í 1959 fór eg at lesa stjórmálafrøði í Aarhus. Í 1967 gjørdist eg lærari á Føroya Studentaskúla.

*Hvussu var at lesa í Danmark um tað mundið?*

– Tíðin eg las var spennandi, og eg hitti nógv gott fólk.

– Tað var í hesi tíð eg hitti konu mína Margit. Vit hittust fyrstu ferð í 1960. Eg var í Tønder í sambandi við at eg var bjóðaður at halda jól hjá einum vinmanni. Vit vóru í einari veitslu, og har var Margit. Hon las til tannlækna, og tað fyrsta hon segði við meg var, at mínar tenn líktist tonnunum hjá einari vinkonu hjá mostur hennara. Hendan konan við tonnunum æt Louisa, og hon var fastur mín.

*Tað var nú skeg og tilvildarligt. Vórðu tit so par longu tá?*

– Nei. Vit vórðu ikki par fyri enn í 1964, og høvdu einki serligt samband hesi fýra árini. Tá hon kom til Føroya í 1964, var hon liðug at lesa, og kom upp at vera feriuavloysari. Hon segði beinanvegin, at hetta var eitt stað hon kundi hugsað sær at búgva. Í 1966 giftust vit og okkum untist at fáa døturnar Ullu og Elin.

### At ferðast upp á tummilfingurin

Umframt at hitta lívsins kærleika sín, hevði Zakarias eisini nakað av ferðahugi og dirvi. Umvegis lesnaðin hitti hann ein góðan vinmann, Peter Hansen. Peter varð seinni professari í stjórnmálafrøði og síðani varaaðalskrivari í ST, og hann fekk Zakarias at ferðast upp á tummilin í Evropa. Zakarias greiðir frá hvussu hetta kom í lag:

– Peter skuldi vitja sína unnustu, ið var sangarinna á einari kasernu í Týsklandi. Vit koyrdu tí sjálvir frá Aarhus til Brússel, og tumlaðu frá Brússel til Luksemborg. Tá vit komu hagar skiltust okkara vegir, og eg fór einsamallur um markið til Frakland. Eg kendi nøkur í Havn ið høvdu keypt sær eini tóm hús har, og tey høvdu veitt mær innivist.

– Eg tumlaði allan vegin úr Luksemborg til suðurstrond Fraklands. Fyrsti sjaførurin sum tók meg upp dugdi eitt sindur av týskum. Tá eg kom yvirum franska markið, royndi eg bara at tosa franskt. Tað var vánaligt franskt, men ein mána seinni bæði tosaði og las eg málið so dánt.

– Fransmenninir vóru blíðir, og tann sum tumlar kemur í prát, tí tað eru prátingarsom fólk ið taka upp tumlarar. Eg varð boðin í konfirmatión hjá einum, og varð á hendan hátt vístur runt í føðibygdini hjá Jeanne d'Arc av nøkrum brøðrum konfirmantsins.

*Hvussu gekk at tumla heim aftur?*

– Tað gekk væl. Men eg mátti sova undir einari brúgv tá eg var ávegis til París. Í Lyon var nevniliga einki pláss á ferðamannaheimi, og so svav eg so søtan har á luftmadrassu í soviposa saman við teimum fittu heimleysu.

– Eg skuldi til Onglands fyri at sleppa við onkrum fari úr Aberdeen til Føroya, men eg slapp næstan ikki inn til Onglands. Ein úr innflytingarkontórinum aftraði seg við at sleppa mær inn tí eg bara hevði fimm pund. Eg royndi at greiða honum frá hvagar eg skuldi, og hvussu eg tumlaði. Til endans lovaði hann mær inn, tí hann hevði ongantíð hoyrt eina so góða søgu.

– Eingin tók meg upp í Vesturonglandi, og veðrið var ringt, og tá svav eg eina nátt undir einum træi. Veðrið batnaði tó, og kom eg til Aberdeen og slapp við einum enskum trolara til Føroya, og løgdu vit at í Havn ólavsøkuaftan 1962.

*Fór tú so beint á ólavsøku?*

– Líka við. Foreldrini vóru á ólavsøku og møttu burturvilsta soninum. Tey høvdu siglt til Havnar við okkara báti. Eg lænti bátin at sigla heim til Kaldbaks at skifta klæðir, og sigldi síðan aftur gjøgnum Hólmasund til Havnar á ólavsøku.

"Nú eri eg liðugur at leypa frá steini til stein. So nú komu vit til vejs ende"

Zakarias hevur ferðast eina rúgvu, tó ikki bara upp á tummilin. Hann greiðir frá ymsum ferðum, eitt nú í størri ferðaliðum sum við studentafylking Sameindu Tjóða, har hann var nevndarlimur. Ein heilt serlig ferð fyri hansara viðkomandi var við felag teirra stjórnmálalesandi í Aarhus, har hann eisini var nevndarlimur og skrivari.

– Í 1962 skrivaði eg eitt bræv til Willy Brandt, at vit vóru fimmogtjúgu stjórnmálalesandi, ið ætlaðu okkum til Berlin, og vildu sera fegin hitta yvirborgarastjóran á máli. Vit fingu skundpost aftur, at hann í løtuni var í Amerika, men fegin vildi síggja okkum. Vit vórðu væl móttiknir í Berlin, og Willy Brandt var ein sera blíður maður, ið júst hevði verið í Amerika og tosað vid Kennedy, ið var forseti har. Eg havi sostatt tikið í eina hond, ið stutt fyri hevði tikið í hondina hjá Kennedy.




– Tað var ein frálík ferð. Vit vitjaðu bæði býráðið í Berlin og tingið í Eysturtýsklandi. Á hendan hátt havi eg vitjað DDR, eitt land, ið ikki er til longur.

### Bókaútgávuvirksemi sum frítíðarítriv

Zakarias hevur givið út, og viðvirkað at geva út, fleiri bøkur, og vann í 2000 Mentanarvirðisløn M. A. Jacobsens í yrkisbókmentum fyri bókina Føroyar á vegamóti.

Tilsamans hevur hann givið út umleið tjúgu bøkur, og hevur rikið bókaforlagið Stiðjan. Mongu bøkurnar av bæði dygdarlesnaði og kunning, hava ment hugaheimin hjá føroyingum í fleiri ár, og serliga kenna vit aftur yrkisbókina Stjórnmálafrøði, ið mong hava lisið í sambandi við samfelagsfrøði undir lesnað, og ikki minst orðabøkurnar. Zakarias greiðir frá hesum:

– Stjórnmálafrøðibókin fekk undanvind. Tað merkti at eg fekk avlop av søluni. Eg hevði mítt starv, og helt tað var løgið at hava avlop av einum frítíðarítrivi, so eg helt meg noyðast at nýta hetta avlop við hygni. Tá fekk eg samstarv við Axel Tórgarð um at týða skúlabøkur innan fornaldarfrøði, sjónleikir og síðan verk hjá Tolkien sum Hobban og Ringanna harra.

– Í 1988 høvdu vit ein fund á skúlanum, og prátaðu vit um at lærararnir vóru harmir um at vit ongar orðabøkur høvdu úr fremmandum málum til føroyskt. Allir næmingar noyddust tí at brúka donsku orðabøkurnar sum Gyldendal hevði. Hugskotið um at spyrja Gyldendal um at selja okkum forritið so vit úr tí kundu gera eina enska-føroyska orðabók kom fram á hesum fundi. Burtur úr hesum kom enska-føroyska orðabókin 1992 og danska-føroyska orðabókin. Sprotanum fyri at takka liggja tær nú á netinum.

– Ein eldsál var Marianne Clausen, sum setti sær fyri at skriva niður í nótum fyrst alt eftir Regin Dahl, og síðani allar upptøkur av føroyskum kvæða- og vísuløgum og harumframt andligum løgum. Hetta megnaði hon at gera liðugt beint áðrenn hon doyði, og eru hesi løg til miklan íblástur fyri okkara tónleikalív. Harumframt eydnaðist at fáa givið út yrkingarnar hjá Suna F. Jacobsen við øllum løgunum í verkinum Um átta minuttir fer Másin avstað.

Tær seinastu bøkurnar, ið komu út, vóru kirkjubøkurnar, ið líka til nú bert hava verið at finna í upprunaligum handritum, sum hevur gjørt tað trupult at leita sær fram kunning. Kirkjubøkurnar hava nevniliga alt um tær kirkjuligu hendingar ið eru farnar fram í øllum prestagjøldum, og eru sostatt sera áhugaverdar fyri bæði søgu- og ættargransking í Føroyum. Vilt tú greiða frá hvussu hetta kom í lag?

– Eg var vorðin formaður í Varðanum, ið hevur givið út nógvar bøkur, og fingu vit hugskotið at fara í holt við kirkjubøkurnar. Eg kom at kenna Johan G. Mikkelsen, tí eg fekk at vita at hann var bragdarmaður mikil á hesum øki. Tíbetur fingu vit Johan saman við soninum Hans Petur at skriva av og geva út kirkjubøkurnar saman við okkum. Ein av nevndarlimunum í Varðanum er Jon Hestoy, og uttan hansara prentsmiðju og áhuga fyri hesum evni hevði hetta verið óhugsandi.

– Føroyingar eru áhugaðir í ætt, men at granska í hesum evni hevur verið stríggið. Keldurnar eru ringar at hava við at gera. Hetta vildu vit broyta, so at vanlig fólk kundu fáa atgongd til hesa vitan á ein lættan máta. Hetta eydnaðist okkum. Árini 2020 til 2024 fingu vit allar kirkjubøkurnar frá 1687 til 1892 prentaðar.

– Ættargranskarar hava havt ringt við at finna út av Suðuroynni – Suðuroyar kirkjubøkur hava ligið har til 1952, og tað hevur verið torført at brúka tær. Nú megnaðu vit at fáa allar bøkurnar við leitiorðalistum út, og ættargranskararnir eru glaðir fyri hetta arbeiði.

– Hetta hava vit Johan G. Mikkelsen fyri at takka – eg havi mestsum bara verið eygleiðari. Tað hevur verið ein sonn frøi at arbeiða saman við so dugnaligum fólkum, ið á elliárum hava avrikað hetta. Ongan av teimum kundu vit havt verið fyriuttan.

### At leypa stein av steini

Við so mongum royndum innan alt møguligt, er so nakað ávíst heiti, ella ávís yrkisleið, tú vildi meint er størsti partur av tínum samleika?

– Nei. Útlendingar eru altíð so ovfarnir av at vit føroyingar gera so nógv ymiskt, men tilvildin ger seg altíð galdandi.

– Til dømis byrjaði samstarvið millum Axel Tórgarð og meg av tí at Axel ikki tímdi við hesum nevndunum, tað helt hann vera tíðarspill, og vildi hann bara fáa meg at geva út fyri seg. Hann var so virkin at tað hálva kundi vera nokk. Á hendan hátt góvu vit so út alt møguligt hann týddi.

*Hevði tú nakað ávíst ynski um hvat tú vildi verða sum vaksin, tá tú var barn?*

– Nei als ikki. Eg havi livað av tilvild. Eg havi lopið stein av steini.

– Tá eg var lærari í Norðradali og Syðradali mátti eg ganga í millum bygdirnar, men vikuskiftini var eg heima í Kaldbak. Tá tað var ringt veður vildi eg bíða til mánamorgun at fara avstað, men tíverri var ikki altíð frægari veður tá. Einaferð var oysregn. Tá eg kom til Týggjará er ein strongur sum Rasmus Effersøe hevði gjørt hjá fólki at halda í fyri ikki at skola oman við ánni. Áin var so stór at ikki var hugsandi at herja á.

– Tá var bara at fara oman í ósan at leypa frá løgarsteini til løgarstein. Men ólukkutíð var háflóð, so steinarnir vóru undir. Einki annað var í at velja en at læta seg úr gummistivlunum og hosunum, smoyggja buksurnar upp um knø og vassa yvirum og skoða seg aftur á innara áarbakkanum. Sama skilið var í Fjarðará.

– Tað ræður um at leypa stein av steini – ikki bara í hesum føri, men gjøgnum alt lívið. Einki er so vist sum deyðin, og eg eri blivin so gamal, at eg kann siga at eg havi livað eitt langt og gott lív. Teimum eg havi gjørt órætt biði eg um fyrigeving.

*Hevur tú nakað serligt ráð tú ynskir at geva víðari?*

– Eingin skal lata seg festa at nøkrum óneyðugum.